




Bæði Hotel Du Nord (t.v.) og Hotel Hebron (t.h.) liggja í hjartanum av Keypmannahavn, so tey eru góð útgangsstøði fyri gestir í býnuma



Morgunmaturin á Hotel Hebron er rættiliga fjølbroyttur og góður



Rúmini á Hotel Du Nord eru rættiliga stór. Harafturat eru fólkini á hotellinum sera hjálpsom

# At búgva í **miðbýnum**

**Eitt tað snildasta tú kanst gera, um tú skalt vitja Keypmannahavnarøkið í nakrar dagar, er at fáa tær pláss á einum hotelli mitt í býnum. Hebron og Du Nord eru heilt víst góð boð**

## KEYPMANNAHAVN

Keypmannahavn er ein deiligur býur, men skalt tú hava lættast møguleika at vitja býin og økið kring býin, so er ein stórur fyrimunur at búgva mitt í býnum. Til tað eru Hotel Du Nord í Colbjørnsgade og Hotel Hebron í Helgolandsgade uppløgd at nýta. Bæði liggja heilt tætt við Hovedbanegården, haðani til ber at fara allastaðni. Samstundis sum bæði støðini liggja á gøtum ímóti Vesterbrogade.

Tað tekur einar tríggjar minuttir at ganga til hovedbanegården úr báðum støðum, og umleið tað sama til Tivoli og Strøget, so hotellini liggja bæði rættiliga væl fyri.

Annars eru hotellini rættiliga lík. Trýstjørnað, har til ber at fáa bæði dupultkømur, familjukømur, suitur og einkultkømur. Fólkini eru sera blíð í báðum støðum, og tað ger upplivingina av hotellunum enn betri.

Kanska eru kømrini á Hebron eitt sindur minni enn tey á Du Nord, men morgunmatarborðið er munandi størri á Hebron, so tað kann vera hugaligari at vakna á Du Nord, men stuttligari at flyta seg ímóti matinum á Hebron.

Hotellini hava eisini tað til felags, at vesini eru júst, sum tey skulu vera. Mann kennir seg á ongan hátt kroystan inni í teimum, og annars eru allir hentleikar: Internet, møguleiki at gera te og kaffi, sjónvarp, eyka streymstikk, strúkijarn og so framvegis.

Harafturat er rættiliga rúmlig lyfta á báðum hotellunum, so um kuffertið vigar eitt sindur ov nógv, so kann gera tað sama, um tú býrt á fyrstu ella ovastu hædd.

Í prísi er munurin øgiliga lítil. Hebron er eitt sindur bíligari, men kømrini eru sum nevnt eitt sindur minni. Men bæði hotellini vísa seg at geva rættiliga nógv fyri pengarnar, tá hugsað verður um, hvussu stutt tað er at ferðast til hovedbanegården og so út í heim.

Eisini er tað soleiðis, at bæði hotellini geva ávís tilboð, so tað er at spyrja eftir teimum, um tit sjálvi umbiðja kamarið.

So ongin ivi er um, at Hotel Hebron, sum nógvir føroyingar hava vitjað millum ár og dag, og Hotel Du Nord eru tvey støð, ið absolutt eru fín at sova í. Bæði um ætlanin er at vera í býnum í nakrar dagar, ella ætlanin er at fara víðari undir syðri himmalhválv.

### Soleiðis finnur tú hotellini

**Hebron og Du Nord eru á tveimum paralellum gøtum, og tey eru øgiliga lætt at finna. Tú fert út gjøgnum norðastu útgongdina á Hovebanegården. Tað er tann til vinstru í mun til Tivoli. Haðani fert tú til vinstru, og har stendur ein rúgva av súkklum. Teimum fert tú framvið og finnur eina trappu, sum ikki er so lætt at síggja. Síðani gongur tú eftir Istedgade til tú kemur til Colbjørnsgade, har Du Nord er, og tú ikki klárar at lata vera við at síggja. Til Hebron skalt tú ganga eina gøtu longri, til tú kemur til Helgolandsgade, har eitt blátt Best Western skelti er.**